Uppskot til semju millum

## Fíggjarmálaráðið

og

## Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Galdandi fyri skiparar og stýrimenn við Strandfaraskipum Landsins

### § 4. Lønarkarmur og tíðarskeið

Semjan er galdandi fyri sáttmálaskeiðið frá 1. oktober 2017 til 1. oktober 2019.

Tann 1. oktober 2017 hækkar lønin 0,5 % og eftirlønin hækkar úr 11 % uppí 13 %.

Tann 1. oktober 2018 verða gjørdar broytingar í skalagongdini. Skiparar og stýrimenn flyta yvir í nýggja lønarstiga við tí starvsaldri, sum teir hava 1. oktober 2018. Framtíðar flytingar í starvsaldri fyri teir, sum flyta 1. oktober 2018, verður roknaður frá hesum degi. Tann 1. oktober 2018 hækkar eftirlønin úr 13 % uppí 13,5 %.

Skipari í bólki I fær harumframt eina ikki eftirlønargevandi viðbót uppá kr. 1000,00 um mánaðin.

Nýggj lønartalva er hjáløgd.

### Dokking

Broytt orðing av § 12, stk. 8:

Fer skip í dokk, verður skipari / stýrimaður umborð, tá ið reiðaríið áleggur honum tað. Verður hetta kravt, skal reiðaríið tryggja manningini góðar umstøður.

Tá Smyril fer í dokk fylgir manningin skipinum, og manningaskift verður ikki framt í dokkingar-tíðarskeiðinum. Fyri arbeiði í frívikuni verður veitt 50% afturat vikulønini fyri 91 tímar.

### Dagførd áseting um barsil

Stk. 1, 2, 5 og 6 í verandi § 18 vera óbroyttar, men broyta nummar, meðan nýggj sjálvstøðug grein um barnsferð verður orðað soleiðis:

Stk. 1. Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.

Stk. 2. Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinnan fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær starvskvinnan farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis vera bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.

Stk. 3. Prógvar starvskvinnan við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør meir enn 4 vikur undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinnan hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.

Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.

Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

Henda grein fær gildi frá í dag og er eisini galdandi fyri tær barnakonur, sum eru í barsilsfarloyvi við løn frá arbeiðsgevara.

### Skipan fyri navigatørar uttan gildugt vinnubræv – nýggj grein

Navigatørar uttan gildugt vinnubræv eru sum meginregla fevndir av høvuðssáttmálanum, tó við teimum undantøkum/ásetingum, sum her eru tilskilaðar.

Stk. 2. Arbeiðsskipanin er 2-1, soleiðis at skilja, at arbeiðstíðin um samdøgrið kann í mesta lagi verða 13 tímar og fyri hvørjar 14 dagar umborð fáa navigatørar 7 frídagar. Onnur skipan kann verða nýtt, um partarnir eru samdir um hetta, tó uttan kostnað fyri reiðaríið.

Stk. 3. Navigatørar uttan neyðuga siglingstíð verða løntir til eina og hvørja tíð eftir lønartalvuni millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag fyri skiparar og stýrimenn hjá Strandferðsluni. Lønin er 75 % av 1. stig í lønarflokki 3 um mánaðin.

Stk. 4. Setanin og ásetingarnar eru bert galdandi í tíðarskeiðinum til viðkomandi hevur siglt sær til fyrsta vinnubrævið, ið er "Vakthavandi stýrimaður". Um viðkomandi heldur fram í starvi eftir hetta, er tað at meta sum nýggj setan, har sáttmálaviðurskiftini og lønin verða sambært vanligu ásetingunum í høvuðssáttmálanum.

Stk. 5. Navigatørar hava rætt til at fáa frálæru í øllum viðkomandi skipanum umborð og tað áliggur reiðarínum at bera so í bandi, at hettar kann lata seg gera.

**Protokollat um viðgerð av mynstring:**

Í sáttmálaskeiðinum verður viðgjørt, um til ber at broyta verandi arbeiðsviðurskifti soleiðis, at fari verður yvir til mynstring.

Hetta merkir, at um semja verður um at broyta arbeiðsviðurskiftini, so kann verandi arbeiðs- og vaktarætlanir verða strikaðar og skipanin broytt, soleiðis at manning umborð á skipum hjá SSL, fer at mynstra á sama hátt sum t.d. á skipum sum sigla í uttanlanda sigling.

**Fyribils tænasta í hægri starvi**.

Partarnir eru ikki samdir um definitiónini av hugtakinum “ein vakt” í § 10 sáttmálanum, og eru samdir um at viðgera spurningin í sáttmálaskeiðnum.

Tórshavn 16. November 2018

Vegna
Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Annfinnur Garðalíð
Formaður

Elias Zachariasen
Næstformaður

Vegna
Fíggjarmálaráðið

Kristina Háfoss
Landsstýriskvinna

Jan Mortensen
Lønarstjóri